Sosialurin

# VARPIÐ

FRÍGGJADAGUR 26. mai 2006



**Fangar í Arnhem**

Í september 1944 vóru fleiri hermenn frá teimum sameindu umringaðir av nasistiskum serherdeildum. Teir flestu yvirgóvu seg til týskararnar. Men fleiri hundrað hermenn goymdu seg fyri nasistunum í vikuvís. Sendingin hyggur aftur á hesar hendingarnar.

**Mikudag 14. kl. 20.35**



**HM fótbóltur: Týskland - Kosta Rika**

SvF sendir beinleiðis frá fyrsta dystinum í kappingini um heimsmeistaraheitið í fótbólti. Undan dystinum millum Pólland - Ekvador er "HM studio" á skránni, har prátað verður um fótbólt. HM studio er fastur táttur á skránni kl.19.30 ta komandi vikuna. Ætlanin er at senda so nógvar dystir beinleiðis, sum til ber, og hetta ávirkar skránna meðan HM-fótbóltur er.

**Fríggjadag 9. kl. 16.55**

**Thelma og Louise**

Thelma og Louise eru um at kvalast av monnunum, og nú skal ein endi fáast á fatanini av, at tær eru ein sjálvfylgja. So tær báðar gera av at fara vikuskiftistúr, sum tó ikki endar sum ætlað. Tær hitta ein mann, sum ikki fatar, at tá ein kvinna sigur nei, so meinar hon nei, og so noyðast tær at flýggja. Amerikanskur filmur frá 1991, óhóskandi fyri smábørn.

**Týsdag 13. kl. 22.00**

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**